# Hamrén: Vit skrivaðu søgu

AaB-venjarin Erik Hamrén fegnaðist í gjár um, at AaB hevði tryggjað sær heiðursmerki í superliguni annað árið á rað. AaB spældi í Parkini, og FCK vann heili 4-0. - Vit hava skrivað søgu í dag. Hetta er fyrstu ferð, at AaB vinnur heiðursmerki tvey ár á rað, og tað fegnast vit um, hóast tað ongantíð er stuttligt at tapa 4-0, segði Hamrén eftir dystin. Hann mann tó síggja stórar møguleikar í at vinna gullið í superliguni, tí AaB skal bert vinna ein av sínum trimum seinastu dystum.



# FCK vann stórsigur á AaB

FCK vann heili 4-0 á AaB í Parkini í gjárkvøld, og harvið var gullveitslan í Aalborg útsett. Liðið hjá Jón Róa Jacobsen - sum ikki fekk spælitíð í gjár - hevur kortini 3 matchbóltar. Fyrst møta teir Brøndby - hvørs áskoðarar ynskja, at AaB tekur meistaraheitið frá FCK - á heimavølli. Síðani skal AaB leika á útivølli ímóti Lyngby, sum longu eru flutti niður í næstbestu deildina. Og á síðsta leikdegi hava teir í AaB heimadyst ímóti OB. So nógv skal ganga galið hjá AaB, um teir ikki gerast danskir meistarar.




*Karoly Potemkin var fyrsti skarprættarin, tá B36 í triðju royndini móti HB loksins setti hol á málskjótingina*

*Mynd: Bjartur Joensen*

## HB-B36 1-2 (0-0):

# Ungarar senda B36 í finaluna

**Ungararnir í B36, Karoly Potemkin og Tamás Nagy, fingu høvuðsleiklutin, tá venjaratoymið hjá árstalsfelagnum sendi sítt gamla felag út í myrkrið. HB megnaði ongantíð at hótta leiðsluna hjá teimum hvítu, sum vunnu seg uppiborið í finaluna í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Fyri løtu síðan skuldi hann sendast heim, men nú hevur hann sent tykkum í himmiríkið!

Seinni hálvleikur er sjey minuttir gamalur og mitt í sigursrúsinum rópar ein kona eftir fjepparafelagnum hjá B36. Undan steðginum vóru fáir møguleikar, men serliga ilskaðu tey í B36-húsinum um Karoly Potemkin, sum tvær ferðir bíðaði ov leingi, tá hann hevði møguleikan at leggja hvítu havnarmenninar á odda. Ungarski framherjin hevur misnýtt fleiri upplagdar málmøguleikar í hesum kappingarárinum, og nú vóru tey í árstalsfelagnum um at missa tolið. Hanus Thorleifsson hevur bóltin á egnari hálvu, og við langari sending finnur hann Potemkin. Framherjin hevur beina kós móti málinum, og Hans á Lag og Pætur Jørgensen royna at øllum alva at renna ungaran aftur. Einsamallur við Trónda Vatnhamar svíkjur hann ikki – hann sendir til høgru hjá málverjanum, og B36-húsið á gosið.

Sanniliga broytist skjótt í fótbólti. Nógv skeldaði Karoly Potemkin og ágrýtni Tamás Nagy fingu høvuðsleiklutin í sigrinum í seinnu hálvfinaluni í steypakappingini móti HB í gjár. Nýggja venjaratoymið í B36, Heðin Askham og Kári Nielsen, sendu sítt gamla felag út í myrkrið, meðan HB framvegis tykjast hava ilt við at fóta sær.

### Lítið at bjóða

Merkisvert var, at Rúni Nolsøe, venjari hjá HB, hevði skift báðar vongverjarnar frá seinasta dysti. Pætur Jørgensen og Rasmus Nolsøe røkti plássini hesaferð, men tað hevur neyvan verið fyri framrættaða spælið. Hesir stuðlaðu sjáldan tannleysu HB-framherjunum, og bara einu ferðina sendu hesir inn í feltið úr síðunum. Men tað sum ikki riggaði frammi á vøllinum, tað syrgdu verjuleikararnir fyri. Serliga hevði Fróði Benjaminsen sera gott tak á Karoly Potemkin í stórum løtum av dystinum. Fyrrverandi B36-leikarin vann flestu nærdystirnar við ungaran.

Benjaminsen stóð eisini fyri naskastu royndini hjá teimum reyðu og svørtu longu eftir fýra minuttum. Eftir hornaspark fekk landsliðsleikarin tánna á bóltin, og í bleytum boga lyfti hann upp um Meinhardt Joensen. Bólturin tók í tvørtræið og aftur í spæl, har Hans á Lag skallaði framvið.

Leikararnir hugsaðu í stóran mun um týdningin handan dystin í fyrra umfarinum. Tað sást væl og virðiliga á avrikinum, har fleiri mistøk vóru. Serliga hevði miðvøllurin hjá B36 ofta hug at tveita bóltin burtur, tó uttan at tað kostaði. Fimti hálvleikur upp í slag millum grannarnar endaði málleysur.

### B36 í finaluna

HB var leikliga omaná undan steðginum, men lítið spurdist burturúr. Á vonginum høvdu Jákup á Borg og Røgvi Poulsen tað truplult, og hesin seinni nevndi var útskiftur tíðliga í seinna hálvleiki, tá Páll Mohr Joensen loysti hann av. Hesin fekk tó lítið gjørt við, at Potemkin legði B36 á odda. Løgið er at tosa um týðandi útivallarmál, tá grannarnir í høvuðsstaðnum hittast, men soleiðis var í Gundadali. HB noyddist nú at fáa tvey mál, um finupláss skuldi gerast veruleiki.

Tamás Nagy var millum mest eyðsýndu á B36-liðnum í gjár. Fleiri ferðir royndi hann at hótta verjuna hjá HB, og ofta høvdu teir trupult at fáa bóltin av honum. Tamás Nagy sendi eisini árstalsfelagið eitt stórt fet nærri finaluni, tá hann á tímanum sendi í málhornið. Einans 17 ára gamli Róaldur Jacobsen slapp frá Rasmusi Nolsøe í høgru, áðrenn hann legði bóltin fyri føturnir á ungaranum, sum ikki ivaðist.

Men júst sum HB var í kjallarnum, so byrgtist ein vón. Miðskeiðis í seinna umfarinum endaði bólturin óskiljandi á arminum á Klæmint Matras, og Petur Reinert, dómari, peikaði á brotssparksblettin. Óneyðugt og tápuligt av miðvallarnum. Andrew av Fløtum sendi trygt í netið, og lítil spenningur aftur í dystinum.

HB skuldi skjóta tvey mál aftrat, og Rúni Nolsøe spenti av álvara álopsbogan seinastu løtuna. Fróði Benjaminsen var fluttur úr verjuni og í álopið, men vandamiklir vóru teir reyðu og svørtu sjáldan. HB hótti ongantíð leiðsluna hjá B36, sum gjørdi lítið burtur úr seinastu minuttirnar.

Potemkin og Nagy syrgdu við hvør sínum máli, at B36 koppaði grannunum fyri norðan, og eru í steypafinaluni. Sigursvanda HB kann nú hugsa um komandi uppgávurnar, sum bíða í landskappingini og í altjóða høpi. Lítil broddur er í spælinum hjá teimum í løtuni, har serliga landsliðsleikararnir gera ov lítið um seg. B36 vann uppiborið, og eru til reiðar til steypafinaluna tann 15. juni á ovara vølli í Gundadali.

## Eitt mál rokkið

Teir eru kanska ikki nøgdir, fyrr enn teir standa við steypinum í hondini. Men liðskiparin hjá B36, Klæmint Matras, viðgekk, at hjá teimum var eitt mál rokkið, nú teir eru í steypafinaluni.

- Tað kann mann siga. Vit seta okkum sjálvandi høg mál, men vit hava ikki vunnið nakra finalu enn, so vit hava bæði beinini heilt niðri á jørðini.

Sæð yvir báðar finalurnar. Hvat gjørdi so, at tað eru tit og ikki grannarnir úr HB, sum skulu spæla finalu?

- Tað er kanska trupult at siga. Talan hevur verið um tveir rættiliga tættar dystir. Men í dag skora vit tvey fantastisk mál í seinna hálvleiki, og aftan á tað haldi eg, at vit hava tamarhald á dystinum. Teir minka um munin við einum bíligum brotssparki, men vit vistu alla tíðina, at teir skuldu hava tvey mál afturat, so rættiligar nervar fingu vit ongantíð. **-mørk**

## Sjálvrannsakan í HB

Andrew av Fløtum var, sum vera man, sera vónbrotin, tá tað stóð greitt, at HB ikki er partur av steypafinaluni í ár.

- Fyrst og fremst vóru tað sjálvandi mál, sum manglaðu. Men eg haldi, at sæð yvir dystir, so sýndu vit ikki rætta viljan, fyrr enn vit í dag koma afturum og standa við rygginum móti múrinum. Inn til tá var tað bara nógv for slapt hjá okkum.

Hava vantandi málini við sær, at tit spæla við hondbremsuni uppi?

- Tað skapar sjálvandi ein ávísan ótryggleika, tá mann veit, at vit ikki hava leverað. Og persónliga eri eg sera vónbrotin. Og eg haldi, at tað nú er tíð til sjálvrannsakan hjá okkum. Akkurát nú er tað í øllum førum ikki nóg gott, staðfesti Andre. **-mørk**